# Ritan anno 2009

JÁKUP AV SKARÐI
f. arbeiðsbólkin



Arbeiðsbólkurin, ið arbeiðir fyri at fáa til vega nýggja Ritu, legði á borgarafundinum í Nólsoy 15. mai fram arbeiði higartil. Orsøkin, at vit settu fram ynski, at Tórshavnar kommuna og nólsoyarnevndin skipaðu fyri almennum fundi, var fyrst og fremst at vita hvat nólsoyingar halda um tær ætlanir vit hava.

Prátið gekk væl og tá ið gott og væl 50 fólk ikki høvdu stórvegis spekulatiónir til okkara ætlanir, so ganga vit áfram við fullum huga at pressa á at nýggja Ritan er tøk á sumri 2009 – í seinasta lagi. Í kortunum liggur, at Jacob Vestergaard kallar SSL og arbeiðsbólkin til fundar fyri summarfrítíðina. Á hesum fundi vóna vit sjálvsagt at SSL hevur góðar ætlanir fyri nýbygging og somuleiðis ítøkiligar ætlanir um tað skip, ið skal røkja samferðsluna komandi tvey árini áðrenn nýggja Ritan er liðug.

Tey krøv, ið arbeiðsbólkurin hevur sett upp snúgva seg fyrst og fremst um komfort og farm. Í krøvunum um komfort, er bæði at ein og hvør sleppur trygt og høgliga í ferðahølið - við egnari hjálp. Harafturat er sjálvsagt eisini krav at ferðafólkið ferðast í friðaligum umhvørvi, har møguleiki er at práta saman og somuleiðis at wc-viðurskiftini eru fyriskipað rørslutarnaðum. Nógv onnur fyrilit eru og tey hevur arbeiðsbólkurin lýst í faldarum, greinum og práti frammanundan.

At krøv eru um farmaflutning, er sjálvsagt við tí í huga, at á dekkinum skal verða rúm fyri tveimum stórum bilum, so oljuflutningur, renovatiónsbilar, handilsfarmur, vanligur bilaflutningur o.m.a. kann fara fram eftir forskriftum, ið hóska nútíðini til. Sjálvsagt eru fyrimunir við líkbili sera frammaliga í huga á teimum, ið hava sæð líkkistu hanga í krana í leysum lofti – lyft beint úr last, ið verður nýtt til so mangt.

Spurningur kann setast við um 6 persónbilar ella fleiri skulu rúmast á dekkinum, men hetta skal eisini haldast í mun til hvussu stórt nýggja skipið skal vera í mun til hvussu onnur skip áður hava eydnast. Okkara uppskot er eisini at ferðafólkatalið er 180 um veturin og so nakað meira um summarið. Arbeiðsbólkurin legði fram, at tá ið talan er um at flyta bilar um fjørðin, skulu atlit sjálvsagt eisini takast til hvussu hetta verður loyst í bygdini, so at hugnaliga bygdarlívið ikki verður órógva ov nógv.

Sjálvsagt hevur SSL tøl av ymsum slag um hvussu ferðast verður um fjørðin. Tó er at hava í huga, at umstøðurnar vit hava livað undir í so mong ár, eisini eru orsøk til at hvørki bila- ella ferðafólkaflutningur kann verða heilt nógvur tá ið hendan Ritan ikki hevur møguleika til tað stóra. Optimalt er at SSL skipar fyri almennum fundi í Nólsoy sum skjótast, har ætlanir verða lagdar til hoyringar. Landsstýrismaðurin hevur kunnað arbeiðsbólkin, at ætlanir eru at skipa fyri fundi í heyst – men tá verður trupult (kanska ógjørligt) at gera broytingar. Tí Jacob Vestergaard hevur givið lyfti um at nú peningur er játtaður til verkætlanina, so verður verkætlanin liðug fyri ársskiftið!

Harvið er møguleiki at nýggja Ritan røkir farleiðina á sumri 2009

# Ensk ávirkan á føroyskt mál er lítil

EYÐUN Á BORG
fø.-, da.-, en.-lærari og puristur



**– donsk ávirkan á føroyskt mál er ovurstór!!**

Forvitnisligur málfyrilestur varð hildin í SVF fyri einum tveimum vikum síðani. Fyrilesturin snúði seg um purismu (málreinsan) og enska ávirkan á føroyskt mál.

DESIGN=SNIÐSKAPAN!? Fólk vórðu m. a. spurd, um tey søgdu design ella sniðskapan. Sjálvur kenni eg, sum eri mállærari, ikki so væl orðið, sniðskapan; finni heldur ikki orðið í orðabókum. Snið og sniðgevi (designer) kenni eg betur.

PURISMA: Annars undrar tað meg, at fólk tosa um purismu í sambandi við enskt mál. Purisma hjá okkum í Føroyum man heldur snúgva seg um danska ávirkan á føroyskt mál.

Fyri fáum árum síðani var ein málráðstevna í Norðurlandahúsinum. Hon var um enska ávirkan á norðurlendsk mál. Áhugaverd ráðstevna um t. d. enska ávirkan á danska málið; men hon hevði ikki so nógv við føroysk viðurskifti at gera.

Munnu málfrøðingar halda, at vit í Føroyum eru í somu støðu sum danir viðvíkjandi enskari málávirkan?

Føroyskt verður í lítlan mun ávirkað av enskum, men í sera stóran mun av donskum!! (Lutfallið er kanska 95-5)!?!

Aftrat móðurmálinum hava vit jú danskt, sum skal lærast næstan líka væl sum føroyskt, áðrenn vit fara til 3. málið, enskt, sum er fremmandamál.

Danskt er allastaðni: sjónvarpstekstur, bløð, bøkur, filmar o.s.fr. Enskum er nógv minni av, og haraftrat líkist enskt nógv minni føroyskum, enn norðurlandamálið, danskt, ger. Tað ger so sjálvandi, at vit ikki so gleivbeint taka við enskum orðum sum teimum donsku, kendu.

Nøkur orð hava vit sjálvandi fingið úr enskum: trolari, slupp o.s.fr., og tað er í lagi; men purisma hjá okkum hevur fyrst og fremst við allar danismurnar at gera: dúkka, interessant, hálvfjerðs (við ð), vanskeligar forhandlingar, gletsjarin smeltar, krisa, nærmari, ellars, bitturheit o.s.fr. o.s.fr.

Taka vit t.d. vanskeligar forhandlingar (torførar samráðingar), so kundu føroyingar ikki funnið uppá at sagt hatta á enskum, "difficult negotiations", tí enskt er so fjart frá føroyskum.

Norðmenn brúka onkur ensk orð í fótbóltsmáli: keeperen, corner. Føroyingar herma bara eftir donskum: hjørna, straffi, bani, felt o.s.fr. Eingin føroyingur sigur hasi orðini á enskum. Hvussu nógvir siga tey á føroyskum, man vera ivasamt.

E.S. At fleiri føroyingar siga design og offside, er neyvan av enskari málávirkan. Vit í Føroyum siga design og offside, tí danir siga tað, ikki tí bretar siga tað.

# Atkomuvegur til Havnar

ANDREAS MOURITSEN

Ein fyribilsloysn varð Hvítanesvegurin kallaður, eftir at Kaldbakstunnilin á heysti 1992 læt upp. Henda fyribilsloysn er tann dag í dag høvuðsfarleið frá øllum norðara parti av landinum til okkara høvuðsstað. Ein varandi loysn lá í kortinum, og hevur verið ávegis leingi, men kreppa, vantandi raðfesting o.a. hava seinkað hesi ætlan.

Í nøkur ár hevur verið arbeitt upp á nýggjan atkomuveg – eg skuldi kanska sagt ein annan atkomuveg, tí Hvítanesvegurin fer framvegis at vera ein høvuðsfarleið til og úr Havnini norðureftir. Hetta arbeiðið er sum vera man nokkso átrokandi, tí ferðslan økist nógv og verandi loysn/fyribilsloysn gerst meira og meira ótíðarhóskandi.

Nýggi vegurin byrjar á Sundsvegnum, har Skálafjørðartunnilin vónandi kemur upp um ikki so langa tíð. Síðani fer hann fram við vestan fyri ídnarøkið á Sandvíkahjalla, eystan fyri garðin á Vatnaskørðum og vestan fyri Stórutjørn. Norðan fyri verandi og komandi íbúðarbygging í Hoyvíkshaganum og yvir í verandi ringvegaskipan við Krákugjógv. Genialt haldi eg sjálvur – tað halda serfrøðingarnir, ið hava gjørt ætlanina óivað eisini. Eitt megnarverk, ein vegur við hugsjón, ein framtíðarloysn langt inn í framtíðina, ein veruligur innkomuvegur til okkara høvuðsstað, ið vit kunnu vera stolt av og øllum brúkarum til gagns.

Men ikki er alt uttan trupulleikar. Nakrir íbúgvar – nakrir, langt frá allir – við Villingardalsvegin hava víst nakað av misnøgd við linjuføringina. Hon gongur ígjøgnum onkra trøð har nakrar dunnur og onkur gás eisini ganga og mala... Sjálvandi óheppið, men hvat skal man gera við tað? Legg vegin upp á hamaran omanfyri sýntist vera loysnin, ið bleiv slongd út. Serfrøðingarnir vóru ikki glaðir fyri ta loysnina, og so kom orðið tunnil sjálvandi eisini upp í hetta kjakið. Endin var, at teinurin ovarlaga á Villingardalsvegnum til Krákugjógv – talan er um eini 800 til 1000 metrar, lá órørt.

– Ein støða lík teirri í Leirvík var veruleiki, hóast onki hoyrdist til hana. Men nú er ein glotti fyri framman, tí sambært heimasíðuni hjá Landsverk fer arbeiðið á hesum teini kortini í gongd í næstum.

Havi skilt, at Landsverk hevur havt kunningarfund við teir "misnøgdu" borgararnir um hvørjar ætlanirnar ítøkiliga eru, og hvørji átøk verða knýtt at vegnum fyri at verja og varðveita verandi umhvørvi í mest møguligan mun. Haldi at hetta er flott av LV.

Havi størstu virðing fyri, at man roynir at verja sína trøð. Sjálvandi óheppið at ein vegur kemur har man áður gekk í friði náðum og íðkaði sítt ítriv og kundi njóta friðin, men veruleikin er bara tann, at vit øll mugu gera okkara til at varðveita vælferð og framburð í landi okkara. Fram við nærum øllum ringvegum í Havn liggja traðir við kríatúrum, hesar vóru har eisini áðrenn ringvegirnir komu. Trúgvi ikki, at tey, ið dagliga virka á hesum traðum, hugsa stórvegis um, at vegur liggur tætt fram við. Tað er í hvussu er ein sannroynd, at ongin í dag hevði viljað havt ringvegirnir burtur. Eri sannførdur um, at sama verður galdandi fyri traðirnar undir hamrinum fram við Villingardalsvegnum. Eftir stutta tíð fer ongin at hugsa um atkomuvegin, og vit fara øll at taka hann fyri givnan. Haldi eisini, at tolnu borgararnir við Hvítanesvegin hava uppiborið ein lætta fyri teirra tol øll hesi árini, vegur teirra hevur verið ein fyribilsloysn sum høvuðsvegur til Havnar. Um stutta tíð fara túsundavís av havnarborgarum og landsborgarum vónandi at fegnast um vegin, meðan lívið á traðunum fram við gongur sína stillu vanligu gongd.

Norðurlendski Mentanargrunnurin:

# Játtar 520.000 krónur til Føroya

MENTAN
*Tíðindaskriv*

Millum ár og dag koma lutfalsliga stórar upphæddir til Føroya úr norðurlendskum grunnum. Ein av grunnunum er Norðurlendski Mentunargrunnurin.

Grunnurin, sum býtir út árliga 25 mió. krónur til norðurlendskar verkætlanir, verður stjórnaður av 13 limum. Tveir limir verða valdir fyri hvørt av ríkjunum, meðan tey trý sjálvstýrandi økini hava hvør sín lim.

Fyri 2007 og 2008 umboðar Jógvan við Keldu aftur Føroyar. Umframt at hann eisini fyrr hevur verið nevndarlimur, er hann limur í Norðurlandaráðnum.

Við at fara inn á heimasíðuna www.nordiskkulturfond.org ber til at síggja, hvørjar verkætlanir grunnurin stuðlar, og eisini síggjast tær verkætlanir, sum grunnurin hevur stuðlað til Føroya og sjálvandi onnur lond. Í høvuðsheitum stuðlar grunnurin upp til tvey ár og at helst skulu verða trý norðurlond um verkætlanina. Grunnurin verður ikki roknaður sum afturvendandi stuðulsgrunnur eftir tey tvey árini.

Leggjast kann eisini afturat, at grunnurin stuðlar millum tvey lond, har t. d. Føroyar kunnu vera við í eini verkætlan, har t.d. Noreg, Svøríki ella Danmark eru høvuðsumsøkjari.

10. og 11. mai var fundur í Keypmannahavn, har 520.000 krónur av 6.9 mió. krónum vóru játtaðar beinleiðis og óbeinleiðis til Føroyar.

**Góðar verkætlanir**

Ein stór verkætlan er í samband við, at Norðurlandahúsið komandi ár fyllir 25 ár og í tí sambandinum leggur til rættis listaframsýning við 17 listafólkum, har 10 teirra eru úr Føroyum, 4 úr Danmark, 1 úr Íslandi og 2 úr Grønlandi.

Umframt at framsýningin verður í Norðurlandahúsinum í Føroyum verður ferðast til Lansmuseet á Gotlandi, til Stavanger kulturstad, Overgaarden ella Sophienhjem í Keypmannahavn og so til Norðurlandahúsini í Reykjavík og Katuaq í Nuuk.

Framsýningin verður mett listarliga at liggja á høgum støði, og at hon ferðast til ymsu londini, verður hildið sum givna orsøk at stuðla hesi verkætlan.

**Nólsoyar Dansifelag**

Svenska Visarkivet hevur vegna Nólsoyar Dansifelag søkt um 120.000 krónur, sum eisini eru játtaðar til eina ferð til norðurlendsku høvuðsstaðirnar Oslo, Helsinki, Stokhólm og Keypmannahavn at vísa føroyskan dans. Ferðin tekur eina viku.

Endamálið er at vísa livandi føroyska fólkadansarasiðvenju og fýri áhugaðar norðurlendingar eini sjálvi at royna dansin. Ferðin verður eisini mett at stuðla undir, at føroyingar halda fram við at menna sangin og dansin. Umframt fara luttakararnir at fáa eina mentanarsøguliga kunning um teir fýra høvuðsstaðirnar.